SKRÁSETING FØROYA
COMPANY REGISTRATION AUTHORITY

Tryggingareftirlitið

# Fulltrúi til Skráseting Føroya & Tryggingareftirlitið

Søkt verður eftir fulltrúa til Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið.

Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið eru fyrisitingarliga skipað saman við Posteftirlitinum, Elveitingareftirlitinum, Kappingareftirlitinum og Fjarskiftiseftirlitinum.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um gjøgnumgongd av roknskapum og at hava eftirlit sambært ársroknskaparlógini, tryggingarlógini, lógini um hvítvask, grannskoðaralógini og vinnufelags-lógunum annars.

Starvið fevnir somuleiðis um málsviðgerð og leiðbeining av viðskiftafólki okkara í spurningum við tilknýti til nevndu lóggávu og at samskifta við okkara samstarvspartar í øðrum londum.

Arbeiðið krevur gott fakligt innlit serliga á roknskaparøkinum. Dentur verður lagdur á at tað arbeiðið, ið verður latið úr hondum er á høgum fakligum støði.

Førleikakrøv eru viðkomandi búskaparfrøðilig kandidatútbugving, t.d. cand.merc.aud., cand. oecon., ella cand. polit.
Royndir innan grannskoðan ella roknskap er ein fyrimunur.

Til rætta fólkið bjóða vit spennandi starv í góðum arbeiðsumhvørvi. Góðir møguleikar eru fyri eftir-útbúgving.

Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Umsóknir skulu sendast til Skráseting Føroya, Sigmundargøta 13, postboks 264, 110 Tórshavn, og vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 5. juli 2010 kl. 12.

Meira um starvið fæst at vita frá Kristin Balle, deildarleiðara, á tel. 356010, t-post krb@skraseting.fo ella frá Katrinu Mariu Johannesen, ráðgeva, á tel. 356027, t-post kmj@tryggingareftirlitid.fo

**Skráseting Føroya, Tórshavn hin 11. juni 2010**